# Fiskimálaráðið

Dagfesting: 26-09-2022

**Fylgiskjal 1**

**Javntekstur**

Galdandi orðingar í løgtingslógini samanbornar við broyttu orðingarnar í løgtingslógaruppskotinum.

| **Galdandi orðingar** | **Løgtingslógaruppskotið** |
|---|---|
| | **§ 1**<br><br>Í løgtingslóg nr. 152 frá 23. desember 2019 um sjófeingi (Sjófeingislógin), sum broytt við løgtingslóg nr. 59 frá 13. mai 202, løgtingslóg nr. 91 frá 7. juni 2020, løgtingslóg nr. 106 frá 29. juni 2020, løgtingslóg nr. 185 frá 18. desember 2020, løgtingslóg nr. 186 frá 18. desember 2020, løgtingslóg nr. 70 frá 5. mai 2021, løgtingslóg nr. 71 frá 5. mai 2021, løgtingslóg nr. 170 frá 21. desember 2021 og løgtingslóg nr. 89 frá 16. mai 2022, verða gjørdar hesar broytingar: |
| **§ 7.** Veiðiloyvið er galdandi til 1. januar 2034. Tá veiðiloyvið fer úr gildi, fara øll veiðirættindi samstundis úr gildi.<br>*Stk. 2.* Rætturin til fiskiloyvi í bólki 5 og rætturin til onnur fiskiloyvi hjá fiskifari í hesum bólki er galdandi til 1. januar 2034.<br>*Stk. 3-4.* … | Í § 7, stk. 1 og 2 verður “1. januar 2034” broytt til: “1. januar 2035”. |
| | |

| | |
|---|---|
| **§ 30.** Egnir fiskidagar kunnu avhendast øðrum fiskifari undir føroyskum flaggi við veiðiloyvi fyri eitt fiskiár í senn ella endaliga. Treyt er, at fiskifarið, sum dagar verða avhendir til, er innan fyri tey mørk fyri stødd ella framtøkumegi, ið skilmarka bólkin. | § 30, stk.1 verður orðað soleiðis:<br>"Egnir fiskidagar kunnu avhendast øðrum fiskifari undir føroyskum flaggi við veiðiloyvi fyri eitt fiskiár í senn ella endaliga. Tá fiskidagar í bólki sambært § 18, stk. 1, nr. 1-4 verða avhendir, er treytin, at fiskifarið, sum dagar verða avhendir til, er innan fyri tey mørk fyri stødd ella framtøkumegi, ið skilmarka bólkin. Fiskidagar, tillutaðir fiskifari til fiskiskap eftir botnfiski á Føroyabanka, kunnu bert avhendast fyri eitt ár í senn." |
| **§ 30. ...**<br>*Stk. 2.* Fyri at avhenda fiskidagar, skulu í minsta lagi 60% av tillutaðu døgunum fiskiárið frammanundan vera brúktir við tí í fiskiloyvinum nevnda fiskifari.<br>*Stk. 3-4.* ... | § 30, stk. 2 verður orðað soleiðis:<br>"*Stk. 2.* Fyri at avhenda fiskidagar fyri eitt fiskiár í senn, skulu í minsta lagi 60% av tillutaðu døgunum fiskiárið frammanundan vera brúktir við tí í fiskiloyvinum nevnda fiskifari." |
| **§ 31**. ...<br>*Stk. 2.* Fyri at avhenda egnan kvotupart, ella egna árskvotu, skulu í minsta lagi 60% av tillutaðu kvotuni av fiskaslagnum, ið verður avhendað, vera fiskað fiskiárið frammanundan við tí í fiskiloyvinum nevnda fiskifari. Undantikin hesi treyt eru fiskasløgini norðhavssild, makrelur og svartkjaftur. | § 31, stk. 2 verður orðað soleiðis:<br>"*Stk. 2.* Fyri at avhenda egnan kvotupart, ella egna árskvotu, fyri eitt fiskiár í senn, skulu í minsta lagi 60% av tillutaðu kvotuni av fiskaslagnum, ið verður avhendað, vera fiskað fiskiárið frammanundan við tí í fiskiloyvinum nevnda fiskifari. Nýtslan verður gjørd upp fyri hvønn fiskiskap á ávísari fiskileið sær. Fiskasløgini norðhavssild, makrelur og svartkjaftur eru undantikin ásetingini í 1. pkt. til og við 31. desember 2026." |
| | Í § 31 verður aftan á stk. 2 sum nýtt stk. sett:<br>"*Stk. 3.* Landsstýrismaðurin kann áseta nærri reglur um í serligum førum at geva undantak frá treytunum fyri avhending fyri eitt fiskiár í senn sambært stk. 2, 1. pkt."<br>Stk. 3-4 verða hereftir stk. 4-5. |
| **§ 36.** Veiðiloyvi og fiskiloyvi hjá fiskifari, bólkur 5, sambært § 18, stk. 1, undantikin, sum ikki hava verið brúkt við tí í loyvinum nevnda fiskifari í tvey ár á rað, falla aftur til landið. Tá veiðiloyvi falla aftur til landið, falla veiðirættindini, knýtt at tí ávísa | § 36 verður orðað soleiðis:<br>"**§ 36.** Veiðiloyvi , sum ikki er brúkt í tvey ár á rað, fellur aftur til landið, samanber tó § 29. Tá veiðiloyvi fellur aftur til landið, falla veiðirættindini, knýtt at tí ávísa fiskifarinum í fiskiloyvum, eisini aftur til landið. |

| | |
|---|---|
| fiskifarinum í fiskiloyvi, eisini aftur til landið.<br>*Stk. 2.* Hevur fiskifar ikki gagnnýtt rættin til egnar fiskidagar ella egnar kvotur við meira enn 30% við tí í fiskiloyvinum nevnda fiskifari í fiskiárinum, fellur munurin millum tað, ið er brúkt, og 30%, aftur til landið.<br>*Stk. 3.* Í serstøkum førum kann landsstýrismaðurin geva undantak fyri einstøk fiskifør í stk. 2.<br>*Stk. 4.* Nýtslan, sambært stk. 2, verður roknað av fiskidøgum ella kvotum, íroknað fiskidagar ella kvotur, keyptar, og frároknað fiskidagar ella kvotur, seldar, sambært §§ 30 og 31.<br>*Stk. 5.* Veiðirættindi, ið eru partar av umbýti sambært § 24, vera ikki tikin við í uppgerðina sambært stk. 1-3.<br>*Stk. 6.* Landsstýrismaðurin kann í uppgerðini av nýtsluni, sambært stk. 2, síggja burtur frá keyptum og seldum veiðirættindum, um hesi eru keypt og seld fyri at sleppa undan, at hesi falla aftur til landið.<br>*Stk. 7.* Brúksskyldan, sambært stk. 1 og 2, fevnir ikki um rættindi sambært § 9. | *Stk. 2.* Hevur fiskifar ikki brúkt rættin til fiskiloyvi til egnar fiskidagar ella egnar kvotur í trý ár á rað, fellur rætturin til fiskiloyvi aftur til landið. Hevur fiskifar rætt til meira enn eitt fiskiloyvi til fiskiskap eftir ávísum fiskaslagi á ávísari fiskileið, verða fiskiloyvini roknaði undir einum. Veiðirættindi, avhendað fyri eitt ár í senn sambært § 30 ella 31, verða roknað upp í uppgerðina av brúki hjá avhendara og verða roknað sum ikki brúkt.<br>*Stk. 3.* Í serstøkum førum kann landsstýrismaðurin geva undantak fyri einstøk fiskifør í stk. 2.<br>*Stk. 4.* Brúksskyldan, sambært stk. 2, fevnir ikki um:<br>1) fiskiloyvi latin til fiskiskap, ið er skipaður við felags árskvotu ella felags fiskidøgum,<br>2) fiskiloyvi latin útróðrarbátum sambært § 18, stk. 1, nr. 5 og onnur fiskiloyvi latin útróðrarbátum undir 15 tons,<br>3) rættindi keypt á uppboði í 2018 og 2019 í gildistíðini sambært § 9,<br>4) rættindi, ið eru partur av umbýti sambært § 24, og<br>5) fiskiloyvi latin til fiskiskap eftir norðhavssild, makreli og svartkjafti til og við 31. desember 2026.” |
| **§ 64.** ...<br>*Stk. 2.* Í reglum, ásettar við heimild í § 5, stk. 3, § 9, stk. 4, § 19, stk. 1-3, § 21, stk. 2, § 22, stk. 1-3, § 23, stk. 1, § 25, stk. 4, § 26, stk. 2, § 27, stk. 2, § 28, stk. 4, § 29, stk. 6, § 30, stk. 4, § 31, stk. 4, § 32, stk. 5, § 33, § 34, § 35, stk. 2 og 3, § 37, stk. 3, § 38, stk. 3, § 39, stk. 2, § 40, § 41, stk. 2 og 6, § 42, § 46, stk. 3, § 49, stk. 10, § 50, stk. 6, § 52, stk. 1 og 2, § 55, stk. 2, § 56, stk. 3, § 71, 2. pkt., kunnu verða ásettar reglur um sekt.<br>*Stk. 3-6.* ... | Í § 64, stk. 2 verður “§ 31, stk. 4” broytt til: “§ 31, stk. 5”. |